# Gágga fiskar meira tosk og hegguslokkurin meira hýsu

**– Endamálið við royndunum var at samanbera ymisk sløg av agni og vita, hvussu tey fiska, siga Jack H. Jacobsen og John Joensen, sum gjørdu kanningina í samband við eina BS-ritgerð í lívfrøði á Náttúruvísindadeildini**

KANNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Í sambandi við ritgerð í lívfrøði á Náttúruvísindadeildini hava Jack H. Jacobsen úr Vestmanna (th.) og John Joensen úr Leirvík kannað eftir, hvat agn roynist best á húki*

Tveir næmingar, sum hava gingið á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya, Jack H. Jacobsen og John Joensen, hava gjørt eina kanning av, hvussu agn av ymiskum slagi roynist í fiskiskapi.

Kanningin er ein partur av eini sonevndari BS-ritgerð í lívfrøði, har Bjarti Thomsen á Fiskirannsóknarstovuni hevur verið vegleiðari og Eyðfinn Magnussen, sum starvast á Fróðskaparsetri Føroya, hevur verið ábyrgdarvegleiðari.

Royndir eru gjørdar umborð á línubáti, 11. og 25. mai í ár, og somuleiðis eru snørisroyndir gjørdar í apríl í ár.

– Endamálið við royndunum var at samanbera ymisk sløg av agni og vita, hvussu tey fiska.

### Gágga og toskur

Teir báðir, sum hava gjørt kanningina, siga, at meginparturin av fiskinum, sum tók á húkin, var hvítingur og hýsa.

Í samandráttinum staðfesta teir, at gággan vísti seg at fiska meira tosk á línu, og haraftrat fiskaði gágguagnið sum heild størri fisk.

– Sum snørisagn fiskaði gággan smærri tosk, og her royndist hon ikki betur enn hegguslokkur, sum er veiddur á Føroyabanka.

Jack og John staðfestu, at eingin stórvegis munur var í fiskiskapinum, tá ið nebbasild og tvinni sløg av hegguslokki vórðu á húkinum.

### Hegguslokkur og hýsa

– Sum heild kann sigast, at gággan fiskar meira tosk, meðan hegguslokkurin er betur til hýsu - og á línuni fiskar gággan sum heild størri fisk enn annað agn, siga Jack H. Jacobsen og John Joensen.

Sosialurin fer at venda aftur til kanningina hjá teimum báðum í einum øðrum blaði.

# Færri fólk flyta til Føroya

**Nettotilflytingin til Føroya í ár er hin lægsta síðan 1997. Bert 130 fólk eru netto flutt til Føroya fyrstu sjey mánaðirnar í ár**

KONJEKTUR-FRÁGREIÐING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Eftir stóru burturflytingina úr Føroyum, sum var undir kreppuni fyrst í nítiárunum, hava fólk seinastu árini í stríðum streymi flutt heim aftur til Føroya. Henda gongd tykist at broytast nakað.

Sambært uppgerðini hjá Búskaparráðnum eru í ár 130 fólk netto flutt til Føroya, sum er munurin millum heimflyting og burturflyting til og úr Føroyar. Nettoflytingini í ár er lægsta tilflyting síðan 1997. Í 1996 fluttu netto einans 100 fólk heim fyrstu sjey mánaðirnar í árinum.

Búskaparráðið sigur, at henda gongd skal tulkast við varsemi, tí heimflytingin hevur verið rímuliga stór seinastu árini. Ráðið heldur kortini tað er eitt rák at hóma frá 2002, tí seinastu tvey árini er nettoflytiingin til Føroya minkað.

– Ein orsøk er helst, at inntøkuvánirnar eru versnaðar seinastu árini eins og bústaðarviðurskiftini ikki eru tey bestu, skrivar Búskaparráðið.




*Flyting frá januar til juli 1996-2004*



# Sethúsaprísurin er støðugur

**Seinastu tvey árini hevur prísurin á sethúsum bæði í Havn og kring landið verið rættiliga støðugur**

KONJEKTUR-FRÁGREIÐING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin. fo*



*Búskaparráðið væntar, at sethúsabyggingin fer at taka dyk á seg komandi árini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Sambært nýggjastu frágreiðingini hjá Búskaparráðnum eru sethúsaprísirnir í Havn og landinum sum heild komnir í eina fasta legu. Eftir hagtølunum vaks sethúsaprísurin javnt fram til á vári 2002, men seinastu tvey árini hevur hann verið rættiliga støðugur.

Búskaparráðið metir fleiri orsøkir verða til, at sethúsaprísirnir ikki eru farnir upp hesi seinastu tvey árini. Ein orsøk er, at útlitini at sleppa framat til at byggja síni egnu hús eru betraði, og tað hevur við sær, at eftirspurningurin eftir gomlum sethúsum ikki økist so nógv longur.

Ein onnur orsøk kann vera, at búskaparligu útlitini ikki eru eins bjørt og tey hava verið, og at húskini ikki eru eins djørv at seta seg í stóra skuld longur.

### Størri bygging

Búskaparráðið sigur í konjekturfrágreiðingini, at síðan í 2000 er miðal talið av nýbygdum sethúsum verið 160 hús um árið, sum er munandi minni enn tey fimtan árini frá 1975 til 1989, tá omanfyri 300 sethús vórðu bygd um árið.

Búskaparráðið væntar, at sethúsabyggingin kring landið fer at taka dyk á seg komandi árini, millum annað tí kommunurnar seinnu árini eru farnar undir at veita fleiri grundtykki til sethúsabygging.




*Myndin vísir fýra ársfjórðings miðal av prísinum á seldum sethúsum í landinum sum heild og í Tórshavn*

# Landsstýrið sovið í tímanum

**Landsstýrið fær toyggið frá Búskaparráðnum í samband við handfaringina av trupulleikunum í alivinnuni. Sambært Búskaparráðnum hevur landsstýrið sovið í tímanum, tí longu á heysti í 2000 fekk landsstýrið eitt rimmar varskó um trupulleikarnar í alivinnum, men kortini vórðu ávaringarnar ikki tiknar til eftirtektar**

KONJEKTUR-FRÁGREIÐING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Í nýggjastu frágreiðingini finst Búskaparráðið at landsstýrinum fyri ikki at hava tikið ávaringarnar frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni á heysti í 2000 í størri álvara.*
*Mynd: Savnsmynd*

Í nýggjastu konjekturfrágreiðingini fyri 2004 leggur Búskaparráðið eftir landsstýrinum fyri ikki at hava tikið ávaringarnar frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni á heysti 2000 í størri álvara. í 2000 varð ein frágreiðing latin landsstýrinum, og tilmælini vóru greið.

Í frágreiðingini varð mælt til eina minking í aldu nøgdunum eins og nágreiniligt tilmæli um brakklegging og onnur umhvørvisverndarlig tiltøk.

– Spurningurin er um støðan, vit eru komin í, við stórum arbeiðsloysi og húsagangi í hesari vinnuni, ikki partvís var óneyðug, um stig vórðu tikin sambært serfrøðingaávaringunum fyri fleiri árum síðan, stendur skrivað í konjekturfrágreiðingini.

Hóast eitt rimmar varskó frá Heilsufrøðiligu Starvstovuni longu í 2000, fekk Vinnumálaráðið ikki sett í gildi nýggjar og herdar reglur fyri aling og sjúkutiltøk fyrr enn um nýggjarársleitið 2003.

– Avleiðingarnar hava verið sera álvarsligar og tað verða tær eisini fleiri ár fram av sjúkuhandfaringini og restandi umhvørvisatlitum í samband við aling á føroyskum firðum, stendur í nýggjastu frágreiðingini hjá Búskaparráðnum

### Atlit fyri fyritøkum

– Almenna fyrisitingin av alivirkseminum tykist at hava havt meiri altlit fyri einstøkum loyvishavandi fyritøkum enn fyri alivirksemi sum heild.

Búskaparráðið leggur ikki fingrarnar ímillum, tá ráðið umrøður spurningin, hvør tað er, sum stýrir alivinnuni. Í frágreiðingini verður sagt, at politiski myndugleikin tekur meira atlit fyri teimum fyritøkum, sum reka vinnu, enn fyri vinnurakstrinum sum heild.

Búskaparráðið metir, at almenna stýringin av alingini eigur í størri mun at endurspegla, at alitilfeingi er landsins ogn.

– Almenna reguleringin av alingini eigur í verki at vera meira opin fyri almenninginum, eftirlitið eigur at vera nógv dyggari og reglurnar eiga at endurspegla, at alitilfeingi eg landsins ogn, stendur í konjekturfrágreiðingini.

# Tænastuvinnan støðuga framgongd

**Hóast støðuga afturgongd í inntøkunum í útflutningvinnunum, hava privatu tænastuvinnurnar á heimamarknaðinum støðuga framgongd**

KONJEKTUR-FRÁGREIÐING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Seinastu tvey árini hevur nógv verið at hoyrt og lisið um, at fallandi fiskaprísirnir á serliga toski og hýsu hava verið atvoldin til minkandi úrtøku í fiskiskapinum undir Føroyum. Meðan tað ikki gongur eftir vild í útflutningsvinnunum í løtuni, kann heimamarknaðurin breggja sær av eini støðugari framgongd.

Sambært konjekturfrágreiðingini hjá Búskaparráðnum eru lønarútgjaldingarnar eini 3 % størri í tænastuvinnunum fyrstu 9 mánaðirnar í ár, enn sama tíðarskeið í fjør.

– Javnur vøkstur er í fleiri tænastuvinnu, men serstakliga í byggivinnuni, handilsvinnuni, flutningsvinnuni og í vinnuligum tænastum hevur rímuligur vøkstur verið, stendur skrivað í frágreiðingini.

Búskaparráðið leggur kortini dent á, at talan er um ein vøkstur í krónuvirði

– Lønarvøksturin í ár hevur í ár verið um leið 4 prosent, og tí er meginpartuirn av tí vøkstri, vit síggja, kostnaðarøking heldur enn í tímatali, sigur Búskaparráðið.

Í frágreiðingini verður kortini víst á, at vøksturin í byggivinnuni er tó so stórur, at har er talan um veruligan framleiðsvøkstur-og ikki bert ein vøkstur í krónuvirði.